## DAGSINS MEINING

# Ein spurningur um stabilitet

Orðaskiftið um løgmansrøðuna hevur á mangan hátt verið sera áhugavert, hóast orðaskiftið ikki kann sigast at hava verið serliga lívligt. Skal ein leita eftir einum tráði í orðaskiftinum, so má tað vera eitt sterkt ynski frá samgongutingmonnum stabilitet og um at endurskapa samanhaldið millum føroyingar. Heildarmyndin ein fær av at lýða á orðaskiftið er, at samgongutingmenn eru avgjørdir um, at hesi samgongu skal verða lív lagað.

Sjálvstýrismálið fyllir nógv í orðaskiftinum. Tað vil so vera, tí hetta mál fyllir nógv í samgonguskjalinum og í sjálvari løgmansrøðuni. Heildarmyndin av andstøðuni er, at vit hava tveir andstøðuflokkar, ið eru sera beiskir um at sita uttan fyri ávirkan. Hesin beiskleiki kemur til sjóndar eitt nú við einum ófantaligum orðalagi. Tónin er sera ironiskur og sarkastiskur. Samgongan verður skýrd at vera ein skurvblanding, orðarætt "eitt skurvut selskap", ein sera niðursetandi og ófólkalig vending, sum eisini varð átalað frá formansætinum. Eisini orðalag sum "gagg-gagg" og tað, sum verri er, vera nýtt um samgonguna og hennara politikk. Hetta sigur eitt sindur um beiskleikan,

Orðaskiftið avdúkaði eisini eina vælskipaða roynd at seta kílar inn í samgonguna. Hetta hendi tá Pól Michelsen úr fólkaflokkinum hevði havt orðið. Pól Michelsen, ið er kendur sum heilhjartaður sjálvstýrismaður, vandaði sær væl um orðini og røða hansara var sum heild sera positiv mótvegis samgonguni. Hann gjørdi vart við sína trúgv uppá, at sjálvstýrismálið var í góðum hondum og á beinari kós. Hann fekk nakrar spískar spurningar, sum hann elegant og avgjørdur avpareraði. Hetta var áhugvert og ikki sørt undirhaldandi.

Um farast skal eftir orðaskiftinum, so verður heildarmyndin av samgongunu tann, at málið er at tryggja stabilitet, at tryggja vælferðarsamfelagið eftir føroyskum fortreytum og við føroyskum avgerarætti, at rekast má ein vinnufremjandi politikkur og at gingið verður støðugt men varliga á sjálvstýrisleið. Samgongan er ung enn, so her kann henda so mangt, men vera hesi mál fasthildin og kunnu flokkarnir semjast, so kunnu úrslitini ikki gerast annað enn góð. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rætting og ískoytið til grein um ullamóttøku

**Suðuroyar Ullvirki og Sirri í Vági**
*Árni Brattaberg*



Í grein í Dimmalætting leygardagin 24. juli verður í samtalu við Peter Haar skrivað um m.a. ullamóttøkurnar sum eru settar á stovn.

Vit ynskja at partvís rætta og eisini leggja afturat orðaskiftinum.

Tað stendur at lesa, at ullarmóttøkan hevur sum krav, at ullin er skild í litir. Okkara viðmerking er, at ullarmóttøkan fær goldið pening fyri at skilja ullina. Viðmerkjast kann, at ullamóttøkan krevur, at ullin, tá hon verður latin inn er:

- pakkað í sekkir,
- er turr
- er rein, tað merkir at lortur er tikin frá

Ullarmóttøkan skilar sær rætt til ikki at taka ímóti ull, sum ikki lýkur krøvini.

Ynskiligt hevur verið, at Royndarstøðin ger ein vegleiðandi faldara um, hvussu ullin skal skiljast og handfarast.

Undir seinastu yvirskriftini í greinini - Tó minni slitsterk - verður skrivað »at føroyska ullin ikki er eins slitsterk sum onnur ull«. Ynskiligt hevði verið at fingið at vita, hvaðani hesin pástandurin kemur.

Vit eru sannførd um, at føroyska ullin er meiri slitsterk enn øll onnur ull, orsøkin er einføld tann, at føroyski seyðurin er tillagaður føroyska veðurlagnum. Føroyska ullin hevur brodd og nyðru. Føroyska tógvið, sum vit spinna, er samfingið, og broddurin ger tráðin slitsterkan. Sirri hevur sum vørumerki, at vørurnar eru slitsterkar!

Longri niðri undir somu yvirskrift nevnd omanfyri stendur at lesa, at »føroysku spinnaríini blanda føroyska og útlendska ull saman«. Vit spyrja; hvørji eru hesi spinnaríini? Tíðin er komin til at tora at greiða frá, hvørji spinnaríini eru. Suðuroyar Ullvirki í Vági er einasta ullvirki í land-inum sum spinnur føroyska ull, ullin verður ikki blandað, og tað hava vit ongantíð gjørt.

Vit vilja gera vart við, at Suðuroyar Ullvirki hevur sum sítt fyrsta boð, at viðskiftafólkini vita hvat tey keypa.

1. Rávøran vit brúka er rein føroysk
2 Ullin verður ikki á nakran hátt kemiskt viðgjørd
3. Vit lita ikki tógvið – harvið hava vit bara reinu náttúrulitirnar, og sum aðalmálið var, verður ikki náttúran dálkað av alskyns kemikalium.

At yvirhalda hesi punktini er ikki léttasta gongda leiðin, tí føroysk ull er tørfør at fáast við. Tað er ikki lætt at spinna fínan tráð sum verður bundin á nýtímans bindimaskinum.

At enda aftur vil endamálið við hesi viðmerkingini. Vit vildu ynskt, at Royndarstøðin gekk á odda og visti, hvørji viðurskifti eru galdandi í ullaspurninginum. Í greinini eru beinleiðis skeivleikar. Samstundis er ynskiligt við einum opnum orðaskifti um ullarspurningin.

# Esbjerg útsligið

Esbjerg er sligið út av Toto Cup, og tískil hevur Esbjerg ikki møguleika fyri at spæla UEFA Cup hetta kappingarárið. Í gjárkvøldið vann Schalke 04 3-0 á Esbjerg í seinna Toto Cup hálvfinalu-dystinum.

Schalke vann fyrra dystin 3-1, og tískil fer Schalke víðari sum sikkur vinnari við 6-1 tilsamsans. Um Schalke 04 vinnur Toto finaluna, so hava teir spælt seg í UEFA cup.

Hinvegin má Esbjerg taka til takkar við Superliguna og norðligu Royal League eftir tapið móti Schalke.

Longu eftir 11 minuttum hevði Schalke lagt seg á odda, tá Mike Hanke skoraði til 1-0. Hamit Altintop og Gerald Asamoah syrgdu fyri endaliga úrslitinum 3-0 til Shalke.

# Scholes fer av landsliðnum

Paul Scholes verður ikki at síggja aftur á enska landsliðnum. 29 ára gamli miðvallarin hjá Manchester United hevur gjørt av at gevast. Paul Scholes spældi 66 landsdystir fyri England og skoraði 14 ferðir.

– Eg havi hugsa um avgerðina leingi, og hetta hevur ikki verið nøkur løtt avgerð. Eg havi spælt á landsliðnum í sjey ár saman við teimum bestu spælarunum og teimum bestu venjarunum.

– EM 2004 var fantastiskt. Men aftaná kendi eg, at hetta er rætta tíðspunktið fyri meg og mína familju at siga stopp. Eg vil fegin takka fyri nøkur framúrskarandi góð ár, og eg ynski liðnum alt tað besta frameftir, segði Paul Scholes um avgerðina at gevast á enska landsliðnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

## VIÐMERKINGAR

# Útlendingarnir mugu hava arbeiði

**Vagnur Michelsen**



Seinastu mánaðirnar hava vit hoyrt nógv um útlendingar í Føroyum. Nógva prátið um útlendingarnar kemur undan kavi, tá tað sansar at við arbeiði í Føroyum, tí útlendingar mugu ikki taka arbeiði frá føroyingum. Soleiðis var eisini, tá ið vit fóru frá góðu 80-árunum og inn í døpru 90-árini. Í teimum góðu tíðunum við nógvum virksemi eru útlendingar meira enn vælkomnir í Føroyum, men nú føla nógvir útlendingar seg illa og vita hvørki út ella inn, tí alt er so ógreitt í løtuni. Og landsstýrismaðurin í útlendingamálum er eisini sera ógreiður og sær út at vera komin í knípu.

Tað er serliga ítrótturin, sum fær at merkja "nýggja " útlendingapolitikkin hjá Jógvani við Keldu, landsstýrismanni, og ein togan fer fram millum ÍSF og landsstýrismannin.

Allir føroyingar eru sjálvandi samdir um, at vit skulu hava ein skynsaman, góðan og menniskjaligan útlendingapolitikk. Vit hava góðar møguleikar at hyggja at grannalondum okkara, sum nógvastaðni hava ovurhonds stórar trupulleikar at dragast við, tí tey á fleiri økjum hava mist tamarhaldið á útlendingapolitikkinum.

Tað sum eg kenni til í ítróttinum, so trívast útlendingarnir væl í landi okkara. Her hugsi eg serliga um eysturlendsku ítróttafólkini, sum spæla fótbólt, hondbólt, flogbólt ella hava fulltíðarstarv sum venjarar. Nógvir útlendingar geva føroyska ítróttinum nógv, men ein annar spurningur er, um vit eru á rættari kós, tá ið útlendingar avgera so nógv í føroyskum ítrótti.

Tá ið tað snýr seg um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum, so er talan um tann ítróttarliga partin og tann menniskjaligi partin. Fyri mítt viðkomandi er tann menniskjaligi parturin avgerandi, og tí mugu vit bjóða útlendingum líka góð kor og góðar sømdir, sum vit bjóða okkum sjálvum. Ein góður bústaður og eitt arbeiði er minsta kravið. Mínar royndir eru, at skulu útlendingarnir trívast í Føroyum, so mugu hesir sleppa til arbeiðis beinanvegin. Teir eru langt heimanífrá, komnir til eitt nýtt land við aðrari mentan og øðrum máli. Tí er arbeiðsplássið so avgerandi, so teir so spakuliga koma inn í tað føroyska samfelagið og ikki sita allan dagin og kúra í einum kamari ella íbúð og bíða eftir, at teir skulu venja um kvøldið.

Annars er útlendingamálið ógvuliga einfalt í mínum hugaheimi. Kunnu útlendsku ítróttarfólkini ikki fáa eitt arbeiði, so hava tey einki at gera í Føroyum. Og alt hetta, at ítróttarfeløgini skulu gjalda ein prosentpart av lønini hjá útlendingunum, sum landsstýrismaðurin vísir á, kunnu vit gloyma alt um. Føroysk ítróttarfelag hava ikki ráð at útvega sær útlendska hjálp, um hesi ikki fáa eitt arbeiði í Føroyum. Trivnaður, arbeiði og harvið tað fíggjarliga hjá feløgunum mugu ganga hond í hond.

So enn einaferð. Skulu útlendingar koma til Føroya at íðka ítrótt, so má minsta kravið vera, at teir hava eitt arbeiði at fara til, og at teir gerast ein natúrligur partur í føroyska samfelagnum.

Eg dugi ikki at síggja, at ítrótturin skal hava sersømdir, tá ið tað snýr seg um útlendingar. Eg dugi heldur ikki at síggja munin á einum polskum sveisara, einum italienskum lækna og einum rumenskum hondbóltsspælara.

At útlendingamálini kunnu avgreiðast skjótari, og at vit flyta útlendingamál úr Danmark til Føroya er sjálvsagt, men hetta eitt annað politiskt mál.

Samfelag okkara er lítið og viðbrekið, tí mugu vit sjálvandi hava ein skynsaman, góðan og menniskjaligan útlendingapolitikk, sum útlendingar í Føroyum eisini fáa gleði av.

# Skráin fyri Summar Festivalin klár



*Boney M verða at síggja og hoyra í Klaksvík leygardagin 15. august á stórari útikonsert í Miðbýnum*

**Nú er greitt, hvussu skráin fyri Summar Festivalin í Klaksvík verður. Fyrireikararnir hava boðað frá, hvørji tiltøkini verða, og hvør skal spæla hvar. Kend útlendsk nøvn og tey fremstu føroysku nøvnini mynda festivalin**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Skráin fyri Summar Festivalin í Klaksvík er núr løgd og tað er lagt upp til hugnaligar dagar í tónleikahøvuðsstaði Føroya. Uttaneftir vitja kend nøvn og ein rúgva av góðum føroyskum nøvnum prýða festivalskránna.

Fyrireikingarnar ganga væl, og tónleikarar gera seg í hesum døgum til reiðar til stóra tiltakið, sum er fyrsti festivalurin, sum ætlandi skal verða afturvendandi tiltak.

24 bólkar og solistar fara at syngja og spæla í Klaksvík í døgunum frá 12. til 15. august. Tiltøkini eru sjey í tali. Morgunmatarborðið, sum Norðoya Sparikassi bjóðar til leygarmorgunin klokkan 10.00, er ókeypis.

Atgongumerkjasølan fer fram á Shell-støðunum kring landið og á Kunningarstovuni í Havn. Atgongumerki verða seld til hvørt tiltak sær, og tí hava fólk sjálvi møguleikan at seta sær sín festival saman, sum teimum passar best.

**Hósdagur 12. august**
Kl. 21.00 Konsert við Pætur við Keldu í Atlantis

**Fríggjadagur 13. august**
Kl. 21.00 Workshop við Ken Hensley (UK) í Atlantis
Kl. 00.00-04.00 Konsert og dansur í KÍ-høllini: Gunnar Mikkelsen (DK), Terji Rasmussen og DJ Cool.

**Leygardagur 14. august**
Kl. 10.00-12.00 Norðoya Sparikassi bjóðar til morgunmatarborð í miðbýnum. Tónleikur verður at hoyra av Sparikassapallinum.
Kl. 15.00-00.30 Stór útikonsert í miðbýnum. Ken Hensley (UK), Boney M (D), Hanus G. Johansen, Hjarnar, Guðrun Sólja Jacobsen, Frændur, Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags, Trølla Pætur & Angela, Credo, Brandur Enni, Týr, Petsi Tvørfoss og Johan í Kollafirði. Sí nærri skrá niðanfyri.
Kl. 01.00-04.00 Dansur í KÍ-høllini: Showmenn, Elton John Jam og DJ Cool.

**Sunnudagur 15. august**
Kl. 20.30 Gospelkonsert í KÍ-høllini: Kjell Samuelson (SE), Hans Inge Fagervik (NO), Torkil Mørkøre og Sigrið Rasmussen & Gunnar Guttesen.

**Skrá fyri Útikonsertina leygardagin 14. august**
Bólkarnir spæla á tveimum pallum. Á tí stóra pallinum á Vágsbøi og á tí hugnliga sparikassapallinum, sum stendur á økinum uttanfyri Norðoya Sparikassa.
V: Vágsbøur
SP: Sparikassapallurin

Kl. 15.00 (V) Trølla Pætur og Angela
Kl. 15.45 (V) Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, setir Summar Festivalin
Kl. 16.00 (V) Credo
Kl. 16.30 (SP) Brandur Enni
Kl. 17.00 (V) Týr
Kl. 17.45 (SP) Petsi Tvørfoss
Kl. 18.15 (V) Hjarnar
Kl. 19.00 (SP) Guðrun Sólja Jacobsen
Kl. 19.30 (V) Frændur
Kl. 20.20 (SP) Hanus G. Johansen
Kl. 21.00 (V) Ken Hensley (UK)
Kl. 22.00 (SP) Johan í Kollafirði
Kl. 22.30 (V) Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags
Kl. 23.30 (V) Boney M (D)

**Heimasíða við upplýsingum og tíðindum:**
**www.summarfestivalur.fo**
**Festivalútvarp á Rás 2 hvønn hósdag kl. 17.00**